## Mourinho ella van Gaal

Enska fótbóltsambandið leitar gjølla eftir einum avloysara til júst fráfarna landsliðsvenjaran, Steve McLaren, og tað tykist at fæðkast við møguligum avbjóðarum til hetta umstrídda venjarasætið. Ein av teimum, ið aloftast hevur verið hildin á lofti, sum besta boð, er bersøgni portugisin Jose Mourinho, ið varð heimskendur í síni tíð í Chelsea, har hann eisini vann teimum tvey Premier League meistaraheiti á rað, í ávíkavist 2004/2005 og 2005/2006. Hin avbjóðarin er hálendingurin Luis van Gaal, sum er ein væl eldri harri, ið hevur alskyns heiðrar at vísa á. Hann kenna vit kanska best frá hansara tíð í Barcelona venjarasætinum. Sami van Gaal hevur kanska tann fyrimunin, at hann hevur roynt at verið landsliðsvenjari. Hetta er nakað, ið Mourinho enn ikki kann reypa sær av.





*Sørvágskvinnur mugu vinna oddabrakið móti ÍF í vikuskiftinum, til tess at gera sær vónir um FM gull í ár.*

# Stórur spenningur í oddinum

**Stóri spenningurin um vikuskiftið er, hvørt SÍ megnar at knúgva ÍF og hála seg upp, ájavnt við damurnar úr Fuglafirði, og á tann hátt økja um spenningin í FM stríðnum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Enn er ÍF ósigrað oddalið í Meistaradeildini hjá kvinnum, og tá tær vitja í Sørvági í vikuskiftinum, kunnu tær rættuliga draga frá hinum liðunum og SÍ, ið sær út til at vera harðasti kappingarneytin hjá fuglfirðingum í ár.

Spurningurin hesaferð er tí um SÍ fer at fáa hevnd fyri tapið móti júst ÍF, ið higartil er teirra einasta tap, og økja um spenningin í oddinum, ella um tað hinvegin verður ÍF, ið fer at leggja seg enn tryggari á odda.

Í SÍ kunnu tey leggja alla sína orku í at fokusera uppá landskappingina, tí tær hava longu vunnið sær rætt í einari finalu í steypakappingini, ið fer at avgera, hvørt lið fer at møta ÍF í árligu stóru steypakappingini, tann 16. februar. Liðið, ið fer at spæla móti SÍ, um rættin til seinna finaluplássið verður funnin fyrst í januar, tá Mjølnir kappingin er á skránni. So spennandi verður at fylgja við, hvørji hesu lið vera.

### Kampur um triðja plássið

Spennandi uppgerð verður í Kollafirði í vikuskiftinum, tá vágagellurnar úr Drátti koma á vitjan. Hesin dysturin kemur at vera avgerandi fyri hvørt av liðunum kann hanga fast í hølunum á oddaliðunum. Sum er, eru bæði liðini ájøvn í stigum, men KÍF hevur tó munin við betri settmuni enn Dráttur.

Tá hesi liðini møttust seinast, var tað annars Dráttur í dró longra stráðið, tá tær vunnu tepurt 3-2, heima í høllini á Giljanesi. Hvussu leikur so fer at ganga í vikuskiftinum, ja tað verður spennandi at fylgja við í.

### Botnstríðið harðnar

Fyri nøkrum árum síðani vóru tað Mjølnir og TB sum ímyndaðu oddin í føroyskum kvinnuflogbólti, men í ár eru bæði liðini í teirru støðu, at tey hava framt stórar útskiftingar á liðnum, og tær ungu kreftirnar hava sloppið til sín rætt.

Mjølnir, ið frammanundan heimadystinum móti Fleyr í gjárkvøldið, ikki var komið á stigatalvuna, kundi við 3-1 sigri bøta um hesa støðu, og leygardagin hava tær so aftur høvið til at gera sær sjálvum kynstrið eftir, tá ungu tvørádamurnar koma á vitjan. Men kennir man treisknið á tvørádamunum rætt, so verður tað ikki nøkur lætt uppgáva, klaksvíkskvinnur skulu royna at loysa.

TB eru áðrenn vikuskiftið á fýra stigum, meðan Mjølnir eru á tveimum stigum.

### Eisini tætt hjá monnunum

Hjá monnum er stríðið í oddinum eisini sera hart. Har eru tað trý lið, ið liggja rættuliga jøvn í oddinum, og tvey av hesum møtast í Sørvági í vikuskiftinum.

Talan er um rættuliga topp uppgerð, tá SÍ og ÍF bresta saman í Sørvági, og má vinnarin sigast at vera væl við í oddastríðnum, har Mjølnir, í løtuni liggja á odda.

SÍ hava fingið sterka Jón Nielsen við aftur á liðið, og fer hann óivað at vera vágamonnum at gagni, nú stríðið tykist at harðna í oddinum. Hinvegin mugu fuglfirðingar taka øll stigini, um teir ætla at hanga við í oddinum

Mjølnir, ið spældu í gjárkvøldið móti Fleyr og vann 3-0, liggur í løtuni á odda við betur málmuni enn SÍ, annars hava bæði liðini 10 stig, meðan ÍF hevur 6 stig. So spenningurin verður í hásæti, tá dystirnar verða bríksladir í gongd.

## Dystir um vikuskiftið

### Flogbóltur

**Meistaradeild kvinnur**

| Dagur | Klokkan | Dystir |
|---|---|---|
| 01.12 | 14:00 | KÍF-Dráttur |
| 01.12 | 14:00 | Mjølnir-TB |
| 01.12 | 14:00 | SÍ-ÍF |
| 02.12 | 14:00 | Mjølnir-SÍ |
| 02.12 | 15:00 | TB-Dráttur |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 01.12 | 16:00 | SÍ-ÍF |